Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Læknaviðurskiftini í Sandoynni

Spurningar:

1. Er landsstýrismaðurin kunnugur við, at helvtin av læknavaktini í Sandoynni verður røkt av avloysarum?
2. Er landstýrismaðurin kunnugur við, at læknar eru, sum ynskja at vera settir í fast starv í ósettu læknavaktini í Sandoynni?
3. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvør orsøk er til, og hvør grundgeving er fyri, hví lækni ikki verður settur í helvtina av læknavaktini í Sandoynni, tá tøkir læknar eru til starvið?

Viðmerkingar:

At hava trygg og støðug læknaviðurskifti er av stórum týdningi. Á leysu oyggjunum, har flutningur til sjúkrahúsini er avmarkaður um firðir og sund, er somikið meira týdningarmikið at hava støðug og álítandi læknaviðurskifti.

Í Sandoynni er ein lækni í føstum starvi, sum harvið fær møguleika at byggja upp tær relatiónir og tað innlit í fólksins heilsustøðu, sum er neyðugt.

Restin av læknavaktini verður røkt av skiftandi avloysarum. Dugnaligir, men skiftandi læknar, sum verrar um kunnleikan, og eisini er merkt av innlits- og tíðarspilli, serliga fyri kronisku sjúklingarnar.

Undirritaði er vitandi um læknar, sum ynskja at vera settir í fast starv at røkja hina helvtina av læknavaktini í Sandoynni, men framhaldandi mugu sandoyingar og skúvoyingar finna seg í eini skipan við avloysarum.
Hettar er ikki í lagi, tá læknar finnast, sum hava áhuga í fastari starvssetan í Sandoyar læknadømi.

Á Løgtingi, 3. juni 2021

Páll á Reynatúgvu